# Føroyingar setast ikki aftur við at fara til Miðeysturs

**Hóast ikki nógvar føroyingar ferðast í Miðeystri í heusm døgum, so merkja ferðaskrivstovurnar ikki, at fólk setast aftur av teimum nógv umrøddu muhammed-tekningunum hjá Jyllands Posten. Danska uttanríkismálaráðið mælir ikki fólki frá at fara hagar at ferðast, men ræður tó dønum til at vísa hógv**

MUHAMMED-TEKNINGAR
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Tað rekur hart á kíkin hjá Danmark í altjóða ódnarveðrinum í løtuni, eftir at Jyllands Posten hevur prentað 12 tekningar av profetinum Muhammed.

Fyri nøkrum døgum síðani frættist, at norðurlendingar vórðu hóttir í Gaza, og í gjár var ein bumbuhóttan ímóti blaðhúsinum hjá Jyllands Posten í Århus.

Føroyingar eru danskir ríkisborgarar, men hóast okkara ríkisrættarligu støða er donsk, verður sambært ferðaskrivstovunum ikki merkt til nakran ótta millum føroyingar.

Á Faroe Travel í Havn siga tey, at áhugin millum føroyingar at ferðast í Miðeystri ella í muslimskum londum ikki er minkaður, og at eingin enn hevur avlýst nakra ferð. Høvuðsmálið á hesum leiðum er helst Egyptaland, sum tó ikki er eins væl vitjað og tey vanligu charterferðamálini. Men tað kemur tó meira enn so fyri, at fólk fara hagar, eins og handilsfólk eisini hava ørindi har av og á, og enn hava tey á Faroe Travel so ikki verið úti fyri, at fólk hava himprast við at fara avstað.

Tey siga, at fólk eru væl upplýst, og vísa til heimasíðuna hjá danska uttanríkismálaráðnum, sum enn ikki hevur mælt fólki til ikki at fara ta ferðast í muslimskum londum, hóast tey eru danir. Tó verður mælt til at vísa hógv.

### Leggja ætlanir fyri summarið

Eitt, ið kann spæla inn, um fólk velja at avlýsa eina ferð ella ikki, er, um ferðin er goldin. Tá kann spurningurin um trygging koma upp á tal, og um ferðamálið hjá hesum fólkum ikki stendur á heimasíðuni hjá uttanríkismálaráðnum sum vandamikið at ferðast í, kann verða trupult at fáa ferðina endurgoldna.

Á Flogfelag Føroya hava tey heldur ikki hoyrt frá fólki, sum hava ætlað sær til Miðeysturs og hava hálsað um.

Tó vænta tey, at fólk hava hetta í huganum í hesum døgum, nú fólk ofta byrja at leggja ætlanir um, hvagar tey skulu vera í summarfrítíðini.

Á Flogfelagnum selja tey mest ferðir til Egyptalands og Turkalands, tá talan er um muslimsk lond, men í løtuni vita tey kortini ikki um nakran, sum er farin hagar.

Fonn Flog í Klaksvík hevur heldur ikki merkt nakra serstaka mistrúgv, hóast tey heldur ikki vita um nakran, sum er í Miðeystri í løtuni.

Tey siga, at vanliga ferðast føroyingar ikki so nógv hesa ársins tíð um talanm ikki er um silvurbrúdleypsferðir ella aðrar merkisdagar.

# Tvøramenn søkja um stuðul til ellis- og røktarheim

**Tvøroyrar Býráð hevur fyri løtu síðani samtykt at søkja landsstýrið um stuðul at byggja ellis- og røktarheim fyri**

ELDRARØKT
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú vilja eisini tvørafólk hava ellis- og røktarheim.

Tvøroyrar Býráð varð kallað saman í skundi seinnapartin í dag at viðgera eldraøkið, eftir at tað gjørdust greitt, at kommunurnar í Suðuroyar syðru helvt fóru at søkja landsstýrið um stuðul til ellis- og røktarheim í Vági.

Á Býráðsfundinum á Tvøroyri samtykti býráðið einmælt at søkja landsstýrið um stuðul at byggja heim til eldri, tað verið seg bæði røktarheim, heim fyri minnisveik og sambýli, alt eftir, hvussu tørvurin er. Tilsamans søkir Tvøroyrar býráð um stuðul at byggja heim til 25 fólk.

Býráðslimir søgdu, at tað var neyðugt at søkja fyri at tryggja sær ein møguleika at koma upp í part, tá ið almenni stuðulin til ellis- og røktarheim, skal lutast út.

Landsstýrið hevur sett 51 milliónir av til at stuðla kommunum at byggja búpláss til eldri í ár, næsta ár og í 2008 og hesum vil Tvøroyrar Kommuna tryggja sær ein møguleika at fáa burturav.

Býráðslimir á Tvøroyri løgdu sostatt dent á, at umsóknin verður send fyri ikki at spæla av við møguleikan at byggja stovnspláss til eldri tey næstu árini.

Men teir løgdu eisini dent á, at hetta skuldi ikki skiljast sum um at Suðuroyggin endaliga var farin í tvíningar í hesum máli, tí teir vónaðu framvegis, at øll oyggin kundi finna saman um eina felags loysn.

Fleiri býráðslimir á Tvøroyri hildu, at tað var neyðugt at kanna tørvin gjølligari fyri at vita akkurát, hvørjum slagi av stovnum til eldri, tørvur var á.

### Ongin avgerð um fígging

At gera ellis- og røktarehim til 25 fólk, sum Tvøroyrar Býráð, hevur søkt um, kostar 30 milliónir. Landið letur í mesta lagi 12,5 milliónir í stuðuli og tað merkir so, at kommunan skal sjálv fíggja 17,5 milliónir.

Hvussu tað skal fíggjast, er støða ikki tikin til.

– Tað er ein spurningur, sum nú skal skal kannast sigur borgarstjórin, Kristin Michelsen.



*Tað var nógv prát ímillum býráðslimir á Tvøroyri fríggjadagin. Her er tað Bergur Bærendsen, vinstrumegin, og Jaspur Vang, sum stinga høvdini saman*

Men tað er í øllum førum greitt, at Tvøroyrar Kommuna sleppur ikki at taka lán, tí kommunur, sum skylda meiri enn eina álíkning, sleppa ikki at taka lán.

Á býráðsfundinum á Tvøroyri týsdagin, varð eisini upplýst, at hinar kommunurnar í Suðuroyar Norðaru helvt, Fámjins, og Hvalbiar kommuna, eru kunnaðar um ætlanina at søkja um stuðul, men at tær høvdu ikki latið frætta frá sær.



Fyri at betra tænastuna hevur Landsverk fingið *eitt* høvuðsnummar fyri alt landið.
Nýggja telefonnummarið er

340 800

Tel 340 800, Faks 340 801
Koyrilíkindir 340 802
lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK
*byggir land*